Jenis av Rana, Miðflokkurin:

# Samgongan ræðist fólksins avgerð…

**Milliardin, sum kemur úr Danmark til Føroyar er bara ein millumrokning millum Danmark og NATO, heldur Jenis av Rana úr Miðflokkinum, sum finst at landsstýrinum, tí tað ikki torir at lata fólkið gera av spurningin um fullveldi**



*– Hvørjar ítøkjuligar ætlanir um privatisering eru gjørdar ella eru í umbúna, vildi Jenis av Rana hava at vita*

SJÁLVSTÝRISSEMJAN
*Eirikur Lindenskov*

– Fyri Miðflokkin hevur tað verið avgerandi, at tað er Føroya Fólk, sum á fólkaatkvøðu ger av spurningin um fullveldi. Vit hava viðurkent rætt landsstýrisins at virka fyri tí politikki, teir vórðu valdir til. Miðflokkurin tók undir við avgerð teirra at fara til samráðingar við danir, men treytaðu okkum – og fingu lyfti um – eina fólkaatkvøðu, ið skuldi verða bindandi.

Hetta sigur Jenis av Rana, tingmaður fyri Miðflokkin, í framsøgurøðu Miðfloksins undir viðgerðini av uppskotinum til Sjálvstýri Føroya Fólks, sum var til viðgerðar í løgtinginum hósdagin.

Jenis av Rana harmaðist um, at eingin fólkaatkvøða verður og spyr, hví samgongan ræðist at lata Føroya fólk ráða í hesum máli. Hann vísir á, at vit í Føroyum flentu at dønum, tá teir ikki virldu góðtaka ES-fólkaatkvøðuúrslit dana, men hildu nýggja atkvøðugreiðslu fyri at fáa »rætta« úrslitið.

– Hjá okkum er støðan verri. Landsstýrið torir ikki eingang at halda eina fólkaatkvøðu, tí teir tykast at óttast eitt úrslit, ið gongur teirra ímóti. Er hetta demokrati, spyr Jenis av Rana.

### Samgongan ræðist sítt egna uppskot

Jensi av Rana spyr eisini samgongutingmenn, um nakar teirra hevði torað at atkvøtt um eina fólkaatkvøðu við eini skiftistíð upp á fýra ár. Hann vísir á, at Miðflokkurin longu eftir fyrstsa samráðingarumfar mælti landsstýrinum til at skriva út fólkaatkvøðu um úrslitið. Men landsstýrið valdi heldur at fara biddaragongd til Danmark fleiri ferðir.

Framsøgumaður Miðfloksins tók eisini saman um tað, sum er komið burtur úr hesi trý árini, sum farin eru av hesum valskeiðinum. Hann helt, at tað, sum eftir stendur, er, at samgongan ræðist sítt egna »bara-fullveldi« uppskot.

Í fyrstuni var einki ófært. Ferð eftir ferð hoyrdu vit, at tað var ikki Poul Nyrup Rasmussen ella aðrir danir, ið skuldu gera av hesi viðurskifti. Men tá Nyrup hostaði fyrstu ferð, hoknaði landsstýrið. Og tá Nyrup hostaði aðru ferð, misti landsstýrið alt álit á føroyingar, staðfestir Jenis av Rana.

### Desperat roynd at bjarga samgonguni

Jenis av Rana lýsir uppskotið sum eina desperata roynd at halda saman upp á samgonguna, heldur enn at halda givin lyfti. Hann spyr eisini, hvussu úrslitið man gerast, tá Poul Nyrup Rasmussen hostar triðju ferð? Hvussu man tað uppskotið, samgongan kemur við, tá síggja út og eita?

### Hvat skal privatiserast?

– Hvørjar ítøkjuligar ætlanir um privatisering eru gjørdar ella eru í umbúna, vildi Jenis av Rana hava at vita frá landsstýrinum. Hann helt fyri, at tá samgongan varð tikin úr respiratorinum ljóðaði, at orsøkin var, at annar landsstýrisflokkur vildi gera eyðmýkingina av hinum fullkomna við at brúka nakrar mánaðir afturat fyri at fáa privatiserað Føroya Banka og Fiskavirking. Jenis av Rana vildi hava at vita, um hetta var so.

Hann helt tað ikki vera rættvíst, at landsstýrið nú ætlar at taka banka Føroya fólks og luta hann út til teir fáu – kanska teir somu, sum í kreppuárunum fyrst fingu ognir sínar bjargaðar gjøgnum bankabjarginginа, og síðani kanska vóru millum teir mongu, ið vórðu saneraðir.

### Milliardin úr Danmark er millumrokning

Jenis av Rana vildi eisini hava at vita, um landsstýrið hevur gjørt nakað fyri at fáa greiðu á, um milliardin úr Danmark er ein gáva, sum fleiri vilja vera við, ella um talan bara er um eina millumrokning millum danir og NATO, har Grønland og Føroyar eru tey stóru aktivini.

– Verður ongantíð tosað um hesi viðurskifti millum landsstýrismenn, ella velur landsstýrið at tiga við hesum av øðrum – okkum í dag loyndum – faktiskum grundum, vildi tingmaður Miðfloksins hava at vita

– Ella trýr landsstýrið upp á danir, sum vælgerarar, uttan at teir fáa nakrar sømdir afturfyri, spurdi hann.

– Støða Miðfloksins er púra greið: Vit føroyingar eiga hesa milliardina við rubb og stubb, og um so er, so er roknistykkið, sum m.a. verður sett upp í fyriliggjandi uppskoti til samtyktar, óveruligt, segði Jenis av Rana.

At enda segði Jenis av Rana, at fullveldismálið hevur yvirskuggað alt ov nógv í føroyskum politikki seinastu trý árini. Hetta helt hann vera spell, tí føroyska samfelagið og Føroyar fólk treingja so harðliga til at onnur mál verða prioriterað.

Helena Dam á Neystabø, Sjálvstýrisflokkurin:

# Skuldu lagt á henda bógvin longu í 1998

**– Vit kunnu harmast um, at samgongan ikki legði á hendan bógv beinanvegin, samgongan sá dagsins ljós í 1998 – tá vóru vit komin væl áleiðis, segði Helena Dam á Neystabø undir orðaskiftinum um Sjálvstýri Føroya Fólks, sum hon skírir eitt hóvligt og realistiskt uppskot**

*– Fyriliggjandi uppskot um sjálvstýrismálið er hóvligt og realistiskt. Hetta átti at verið gjørt frá byrjan, helt Helena Dam á Neystabø*



SJÁLVSTÝRISSEMJAN
*Eirikur Lindenskov*

– Lurta vit eftir, hvat andstøðan hevur sagt um hetta mál, so eigur hendan ætlanin ikki at vera í andsøgn við tað, teir hava ført fram. Bæði Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Miðflokkurin hava sagt, at Føroyar skulu miða eftir at gerast fíggjarliga sjálvbjargnar, og at Føroyar skulu taka alsamt størri ábyrgd av egnum málsøkjum, segði Helena Dam á Neystabø, framsøgukvinna Sjálvstýrisfloksins undir viðgerðini av uppskotinum um Sjálvstýri Føroya Fólks hósdagin.

Hon helt, at hetta er eitt gott og rætt endamál hjá øllum føroyingum at seta sær, og viðgekk, at tað sjálvandi verða tøk, sum skulu takast, serstakliga, tá ið hugsað verður um, at heildarveitingin skal minka og at enda hvørva.

– Tó er tað munandi meira virðiligt, at vit føroyingar sjálvir seta okkum fyri at fremja hesa minking, tí vit vita, at gera vit tað ikki, so verður tað kortini gjørt eftir boðum frá donsku stjórnini. Tað eru greiðar fráboðanir komnar um tað longu nú, segði hon.

### Taka dekan ov rívan til…?

Helena Dam á Neystabø helt tað vera umráðandi at seta á stovn Búskapargrunn Føroya, serliga nú, vit standa á gáttini til eina møguliga oljuvinnu, og tað er í tí sambaninum sera umráðandi, at inntøkur, sum kunnu standast av slíkari vinnu, koma komandi ættarliðum til góða, helt hon.

Framsøgukvinna Sjálvstýrisfloksins setti spurnartekin við, um tað ikki var at taka dekan ov rívin til, at minka heildarveitingina við 3-400 milliónum krónum í 2002.

– Vit í Sjálvstýrisflokkinum vildu mælt til at byrja við eini minking upp á í mesta lagi 300 milliónir, og at vit vera sera varin, tá ið um sølu av almennum fyritøkum ræður, segði hon.

Hon helt eisini, at tað er umráðandi, at tey í løgtinginum semjast um, at tá ið føroyski búskapurin skal lagast til nýggjar umstøður, so skulu vit ikki fremja sparingar innan trivnaðarmálini, og tað eru heilsumálini, almannamálini og skúlamálini.

### Fólkaatkvøða tryggjar øll áhugamál

Helena Dam á Neystabø vísti eisini á, at fyri at tryggja áhugamálum hjá øllum flokkum, og ikki minst hjá Føroya fólki, er í løgtingssamtyktini ásett, at fólkaatkvøða skal vera, áðrenn Føroyar verða skipaðar sum eitt sjálvstøðugt land, sum eitt fullveldisríki.

– Tað er við teirri vón, at hendan løgtingssamtyktin – og tann ætlan, sum verður fráboðað í løgtingssamtyktini – átti at verið før fyri at savnað ein rættuliga breiðan meiriluta í Føroyum, í hvussu so er sum fráliður, at hetta uppskot verður lagt fyri løgtingið, segði hon.

Helena Dam á Neystabø vísti eisini á, at Sjálvstýrisflokkurin var tann fyrsti sjálvstýrisflokkurin í Føroyum, og at nógv kortini er broytt síðani tá.

### Nógv spjaðing um sjálvstýrismálið

– Tíverri hevur tað verið nógv spjaðing politiskt um júst hetta mál. Henda spjaðing hevur sjálvsagt gjørt sítt til, at vit framvegis í dag 2001, smá 100 ár eftir, at Sjálvstýrisflokkurin varð stovnaður, ikki hava fingið ein grundleggjandi virðuskifti upp á pláss, sum sjálvsavgerðarrætt Føroya. Hesin spurningur um sjálvsavgerðarrættin átti eisini at verið avgreiddur við hesum uppskoti, tí tað byggir á tann veruleika og tá fatan, at Føroyar eru eitt land við sær.

Helena Dam á Neystabø heldur, at tað hevði verið ófyrigeviligt, um hetta sama stríð á sjálvstýrisveiginum í føroyskum politikki skuldi ført við sær, at heldur ikki hendan samgongan tók eitt veruligt stig fram á sjálvstýrisleið í føroyskum politikki.

– Tað var jú eitt av høvuðsendamálunum hjá hesari samgongu, at orða ein realistiskan sjálvstýrispolitikk, segði hon.

### Skuldu lagt á hendan bógvin frá byrjan

Helena Dam á Neystabø greiddi síðani frá gongdini í málinum frá november, tá samgongan ásannaði, at fullveldið ikki gjørdist veruleiki í hesum valskeiðinum. Síðani segði hon, at tráanin eftir at gerast sjálvbjargin og at taka ábyrgd av egnum viðurskiftum er sjálvur lívsneistin hjá fólki okkara.

At enda segði Helena Dam á Neystabø, at fyriliggjandi uppskot til samtyktar er hóvligt og realistiskt uppskot um, hvussu farast kann fram.

– Vit kunnu harmast um, at samgongan ikki legði á hendan bógv beinanvegin, samgongan sá dagsins ljós í 1998 – tá vóru vit komin væl áleiðis.



# Ósemja um leinging av flogvøllinum

**Landsstýrismaðurin við vinnumálum, ætlar at yvirtaka og leingja flogvøllin. Hann heldur, at tað er nokk at leingja vøllin við 200 metrum. Men borgarstjórin í Sørvági er ósamdur**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Eivind Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, óttast fyri, at ætlanin hjá B jarna Djurholm, landsstýrismanni við vinnumálum, líka nógv er at flyta flogvøllin úr Vágum, sum bara at leingja hann við 200 metrum*

*Mynd: Edvard Joensen*

Flogvøllurin í Vágum skal yvirtakast og leingjast, sigur landsstýrismaðurin við vinnumálum. Men hansara tøl samsvara ikki við tøl, hjá Statens Luftfartsvæsen, sum enn eigur vøllin.

Sambært landsstýrismanninum við vinnumálum, Bjarna Djurholm, fer tað at kosta 137,4 milliónir krónur at leingja flogvøllin í Vágum við 200 metrum og seta ta keyptu glíðibreytina upp.

Tað undrar Eivind Jacobsen, borgarstjóra í Sørvági, hvaðani landsstýrismaðurin hevur fingið tey tølini frá. Tí hann vísir á, at í 1988 varð gjørd ein umfatandi ætlan fyri útbyggingum av flogvøllinum. Hendan ætlanin umfataði tríggjar møguleikar. 200 metrar, 400 metrar og 600 metrar. Og tá kostaði tað 185 milliónir at leingja vøllin 200 metrar, sigur Eivind Jacobsen.

Til tað sigur Bjarni Djurholm, at tað er tí, at talan er um tvær ymiskar »trygdarsonur« í samband við leingingina.

### Ymiskar fyritreytir

»Trygdarsonan« er stutt og greitt breiddin á vøllinum frá miðjuni út á kantin hvørjumegin við, greiðir Niels Witnher, fulltrúi í Vinnumálastýrinum, frá. Og prísmunurin, sum er millum 1988 ætlanina og ta, sum nú er gjørd, er tann, at nú verður roknað við 75 metra trygdarsonu, meðan tað í 1988 varð ætlað at vera 150 metra trygdarsona.

Tann fyrra er í grundini tann rætta, sigur Niels Winther, men hendan, sum nú verður roknað við, verður gjørd við undantaksloyvi frá altjóða loftferðslumyndugleikunum.

Prísmunurin stendst tó ikki bara av sjálvari breiddini, sigur Niels Winther. Men eisini av, at í 1988 ætlanini var neyðugt at flyta fleiri bygningar fram vil flogvøllinum, um ætlaða breiddin upp á hálvtannaðhundrað metrar skuldi haldast. Ikki bara bygningar inni á sjálvum flogvallarøkinum, uttan eisini bygningar uttan fyri økið.

### Skeivir upplýsingar

– Tá Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at tað bara ber til at leingja flogvøllin við 200 metrum, er tað beinleiðis skeivt, sigur Eivind Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági. Hann vísir aftur til kanningarnar og ætlanina frá 1988, sum sigur, at tað ber væl til at leingja vøllin við 600 metrum heilt upp til 1850 metrar.

Fáa vit ein flogvøll upp á 1850 metrar, lýkur hann øll tey krøv, føroyingar yvirhøvur fara at seta til flogferðslu, sigur Eivind Jacobsen. Tá fáa øll flogfør, sum kunnu vera aktuel at brúka her, lent og lætt. Hann væntar ikki, at vit nakrantíð fara at hava brúk fyri »Jumbo Jet ella flogførum av slíkum dimensiónum« til okkara ferðslu, sum hann tekur til.

Men Bjarni Djurholm vísir hinvegin á, at tá hann tosar um 200 metrar, er tað tann longdin, sum vit fáa mest gagnnýtslu burturúr.

Fysiskt er einki í vegin fyri at leingja flogvøllin til 1850 metrar, sigur landsstýrismaðurin. Men so fáa vit ikki brúkt teir seinastu 600 metrarnar til nakað kortini orsakað av innflúgvingarvinklinum, sigur hann, uttan tó at duga at greiða nærri frá, hvat tað er við vinklinum, sum ger, at vøllurin ikki kann brúkast.

Men Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri kann geriða frá tí, hann heldur, landsstýrismaðurin meinar við.

Tað, sum hendir har, sigur Finnbogi Niclasen, er, at vøllurin kemur so langt út, at flogfarið fær minni pláss at flúgva millum fjøllini og vøllin. Sostatt noyðist flogfari at stoyta seg eitt sindur krappari, enn um tað kundi flogið longri tein inn móti vøllinum í beinari linju.

Men hann dugir ikki at siga, um tað fer at hava nakra ávirkan yvirhøvur á tey flogfør, sum koma at verða brúkt, sigur flogvallarstjórin.

Hann nevnir, at verður flogvøllurin longdur við 200 metrum til 1450 metrar, ber til at brúka Boing 737 flogførini, sum Maerks Air brúkar í dag, við fullum stólatali. Sum er, er vøllurin so mikið stuttur, at neyðugt er at taka nøkur setur úr flogfarinum orsakað av vektini.

Eisini hevði borið til hjá Atlantsflog at fingið eitt størri flogfar, um 200 metrar komu afturat vøllinum. Flogfarið, sum í dag verður nýtt, er eitt BAE-200, meðan eitt BAE-300 flogfar hevði havt eini 20-30 setur aftrat.

Finnbogi Niclasen sigur annars, at hann hevur onga viðmerking til hetta málið, tí hann veit einki um tað. Eingi myndugleiki hevur vent sær til hansara. Tað hann veit, hevur hann hoyrt og lisið í pressuni, sigur hann.



*Verður flogvøllurin longdur við 200 metrum, kann Atlantsflog brúka størri flogfar enn tað núverandi*

### Annað aftanfyri

Eivind Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, hevur einki álit á hesi ætlanini hjá landsstýrismanninum soleiðis. Hann óttast, at okkurt heilt annað enn bara ein yvirtøka og leingjan av vøllinum í Vágum liggur aftanfyri, sigur hann.

– Eg eri bangin fyri, at tað verður arbeitt við at flyta flogvøllin.

Eivind Jacobsen vísir á, at í ætlanini, sum nú fyriliggur, er bara talan um at leingja vøllin og seta glíðibreytina upp. Einki verður nevnt um ta alneyðugu útbyggingina av terminalinum, har alt ov lítið pláss er.

– Tað er ein vánalig ætlan bara at tosa um at flyta eina grótrúgvu úr Gásadalstunnlinum suður um endan á flogvøllinum fyri síðan at gera meira, tá tað liggur fyri, sigur Eivind Jacobsen.

Nei, hann metir, at tað, sum veruliga liggur aftan fyri er, at nú skal fólk fáa ta fatan, at tá hesir 200 metrarnir eru gjørdir, ber ikki til at gera meira. Og tá so allir møguleikar eru brúktir í Vágum, má ein nýggjur, stórur flogvøllur til nógva ferðslu gerast aðrastaðni.

Men so er ikki, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum. Men hann ásannar, at hetta er tað, sum gerast kann, sum støðan er nú, og tá tosað verður um hendan flogvøllin.

– Men verður tosað um at gera størri flogvøll, er støðan ein onnur. Og tað er ikki tikin støða til, um tað skal gerast nakar annar flogvøllur aðrastaðni, sigur hann, og tekur aftur í aftur, at tað, sum kann gerast í Vágum, eru hasir 200 metrarnir, um full gagnnýtsla skal fást burturúr.